## Mangir eru mátarnir…



Næsta fríggjadag skulu allir píkarnir undan bilunum á føroysku vegunum – og í morgin er flaggdagur. Hetta er uttan iva hugskotið til hesa lýsing frá Bilrøkt um dekkskift. Gamli Mercedes bilurin verður ein av teimum, sum í morgin, flaggdagin, fer at koyra skrúðgongu í miðbýnum í Havn, so sum síður hevur verið teir 18 flaggdagarnar síðani 1992, tá felagið Føroya Ellisakfør varð stovnað

# Nú verður skonkt á Toftum

**Hóast fimm av sjey bygdaráðslimum í Nes kommunu mæltu frá at geva Café'ini í Hópinum á Toftum hálvt skeinkiloyvi, hevur loyvisnevndin nú givið hetta loyvi kortini. – Eg sovi væl fyri tað, um kafé'in nú hevur fingið hetta loyvi, sigur borgarstjórin, Símun Johannesen**

SKEINKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið vóru fyrstu sterku ølirnar trektar upp í Café Hópinum á Toftum og settar á borðið.

Tað eru systrarnar, Joan Mikkelsen og Susan Johannesen, ið reka kafé'ina, sum er í sama bygningi sum matvøruhandilin á Toftum – ella í Hópinum, tey rópa.

Tað var hin 6. mai í fjør, at løgreglan sendi Nes kommunu eina umsókn hjá kafé'ini um hálvt skeinkiloyvi til ummælis.

Eftir viðgerðina, mælti mentanarnevndin frá at geva skeinkiloyvi.

Grundgevingarnar vóru, sum sagt verður í tilmælinum, at "tað er vísindaliga prógvað, at jú lættari tað er at fáa fatur í rúsdrekka, meira verður drukkið, og ta gongdina ynskir mentanarnevndin ikki í kommununi..."

Mentanarnevndin mælti eisini frá at viðmæla við teirri grundgeving, at kafé'in liggur niðri á havnalagnum, "... har nógv arbeiðsfólk, sjófólk og onnur hava sítt dagliga yrki, og tí kafé'in liggur beint uppat einasta handli í bygdini og ikki minst liggur á tí mest sentrala økinum, har okkara ungu halda til...", sum sagt verður í grundgevingunum.

- Vit ynskja ikki at lata upp fyri fríari atgongd til rúsdrekka her í kommununi og mæla tí frá at játta skeinkiloyvið til Cafe´ina í Hópinum, segði mentanarnevndin.

Tá málið kom til endaliga støðutakan á almennum fundi í Nes kommunu, vóru hølini fullsett við fólki.

Tilmælið hjá mentanarnevndini fekk 5 atkvøður fyri (Helen H. Jacobsen, Petur í Túni, Elin á Torkildsheyggi, Petur J. Petersen og Súni í Hjøllum).

Ein atkvøða var blonk. Tað var borgarstjórin, Símun Johannesen.

### "Eg sovi væl.."

Nú loyvisnevndin kortini hevur samtykt at geva Café'ini í Hópinum hálvt skeinkiloyvi, og fyrstu ølirnar vóru trektar upp í gjárkvøldið, sigur Símun Johannesen, borgarstjóri, at hann fer ikki at liggja í andvekri av hesi orsøk.

- Mær vitandi hevur siðvenjan verið, at loyvisnevndin fylgir tilmælinum hjá viðkomandi kommunum í slíkum málum, men tað hevur hon so ikki gjørt í hesum førinum. Eg havi ikki sæð loyvi enn, men veit, at Café'in í Hópinum skonkti fyrstu ferð í gjárkvøldið.

Sum nevnt, tók Símun Johannesen sum hin einasti bygdaráðslimurin ikki undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

- Tað var bevíst, at eg atkvøddi blankt, og kanska havi eg angrað, at eg ikki atkvøddi ímóti tilmælinum.

Hann sigur seg ikki duga at síggja, at tað nyttar nakað at binda fólk niður við forboðum, sum hann tekur til.

- Eg eri rættiliga avkláraður við eina slíka støðu, tí eg haldi, at fólk eiga at sleppa at ráða sær sjálvum. Hetta fer ikki at geva mær svøvnleysar nætur, sigur Símun Johannesen, borgarstjóri.



*- Eg eri rættiliga avkláraður, og eg vænti ikki, at hálva skeinkiloyvi hjá Café'ini í Hópinum fer at geva mær svøvnleysar nætur. Tað nyttar einki at binda fólk niður við forboðum, heldur borgarstjórin í Nes kommunu, Símun Johannesen Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Mohamed frá X-factor til Føroyar




**Ungi finalisturin frá ársins X-factor kapping, Mohamed Ali, verður høvuðsnavnið á Barnafestivalinum í Grasagarði, sum í ár verður leygardagin 4. juli.**

Aftur í ár skipar Margarinfabrikkin í Havn fyri Barnafestivalinum, sum enn eina ferð hevur nógv at bjóða tí yngsta ættarliðnum. Barnafestivalurin verður í Grasagarði leygardagin 4. juli frá klokkan 11 til 17.

Høvuðsnavnið á festivalinum hesa ferð er 15 ára gamli Mohamed Ali, sum kom heilt í finaluna í donsku X-factor kappingini, har hann leingi var stóri favoritturin hjá mongum. Nú kunnu ungu fjeppararnir í Føroyum eisini sleppa at uppliva hann »live«.

### Fleiri góð nøvn

Harumframt kann Barnafestivalurin eisini bjóða nøvn sum Jensinu Olsen, kend frá eitt nú »Ding dang pappsang«, Trøllapætur og Ommuna, umframt Beintu, Absalon og Dukkudreingirnar.

Aftrat hesum verða kór, dansur, sjónleikur og annað við ungum frá Margarinfabrikkini á skránni, umframt at ein bólkur kemur frá Pakkhúsi 4 á Tvøroyri.

Fyrireikararnir arbeiða støðugt við at útbyggja Barnafestivalin, og ikki er óhugsandi, at okkurt annað navn fer at koma á plakatina aftrat.

### Øll hjálpa til

Endamálið við Barnafestivalinum er sambært fyrireikarunum, at seta eitt gott punktum fyri veturin við at geva børnunum ein pall og eitt gott tiltak, har fokus verður sett á børnini. Hetta skal vera ein dagur, sum burturav er fyri barnið og familjuna.

Aftur hesa ferð verður hvør krókur í Grasagarði brúktur til tiltakið, ið bæði hevur smábarnaøki, grill, hoppiborgir, andlitsmáling, tekni- og perluverkstað o.a. at bjóða luttakarunum.

Fyrireikarar siga, at børnini og tey ungu, sum í vetur hava gingið í Margarinfabrikkina, sjálvi skulu skipa fyri, soleiðis at Barnafestivalurin í ár kann gerast eitt savningarstað fyri børn og ung. .